# REINSAÐUR FYRI NÆSTAN ALLAR SKULDSETINGAR

– TAÐ ER MEIRA ENN **MARGHÁTTLIGT**, AT EG SUM STOVNARI AV **KRIS**, SKULDI VERÐA **LAGDUR UNDIR** AT FREMJA **KYNSLIGAN** ÁGANG MÓTI **BØRNUM**. OG **VIT**, SUM HAVA LAGT SO NÓGVA **ORKU** Í AT LÆRA **BØRN** OKKARA AT SETA **MØRK**, SIGUR **HANS EILER HAMMER**, PRESTUR SEINASTU ÁRINI Í **BERLEVAAG** Í NOREGI. HER SIGUR HANN FRÁ, HVUSSU **NÓGV** TEY HAVA VERIÐ **ÍGJØGNUM**



**INTERVIEW**
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Ein svár tíð hjá sóknarprestinum Hans Eiler Hammer og familju hansara er av. Hans Eiler Hammer upplivdi sum sóknarprestur í Berlevaag í Noregi at vera skuldsettur fyri at hava sent ónærisligt sms til dóttrina. Nú eru næstan allar skuldsetingar tiknar aftur. Løgreglan er komin til, at har er ikki grundarlag fyri at reisa ákæru og vil geva Hans Eiler Hammer eina bót. Eina bót, sum hann undir ongum umstøðum fer at góðtaka, tí ákæruvaldið hevur ikki nakað prógv í málinum. Tí endar málið í rættinum.

– Hetta hevur verið ein ræðulig tíð, og Gud viti, um børnini sleppa uttan mein burtur úr hesum, sigur presturin, sum nú sigur sína søgu. Hann mælir samstundis fjøðlmiðlunum í Føroyum til at geva teimum frið, soleiðis at tey kunnu byrja av nýggjum. Børnini hava brúk fyri stuðli og umsorgan og ikki almennari umtalu, sum skaðar meir, enn hon gagnar.

Tað var hósdagin 22. apríl í ár, og prestahjúnini Hans Eiler og Linda Hammer gingu heima og fyrireikaðu felags 40 ára føðingardagin, sum tey ætlaðu at halda kvøldið eftir.

## Ein bumba

– Tað kom sum ein bumba, tá ið politiið og barnaverndin komu á dyrnar. Hvørki okkara var handtikið, men politiið kom og skuldsetti meg, og hald varð lagt á allar átta telefonirnar og seks fartteldirnar, sum vóru í húsunum.

– Eg segði tað við tey beinanvegin, at har var einki at finna. Vit hava einki at dylja, sigur Hans Eiler Hammer.

Bæði børn og foreldur vórðu avhoyrd, men tey høvdu einki at upplýsa.

Í fyrsta umfari hevði Hans Eiler Hammer onga hóming av, hvør upprunin var til alt hetta, men tað funnu tey útav.

> **Tey vildu eisini vita, um hon ella nakað av hinum systkinunum varð sligið heima, og gentan fortaldi, at tað einasta var, at mamman eina ferð hevði flongt tann yngsta beiggjan**

Barnaverndin fór av stað við trimum teimum yngstu børnunum. 15 ára gamla dóttirin fór á eitt ungdómssentur, og tey yngru til eina pleygufamilju í eini grannabygd.

Fýra telefonir fingu tey aftur sama kvøld, og hitt kom so við og við. Tey fingu at vita, at telefonirnar vórðu kannaðar meir enn tvey ár aftur í tíðina.

Aftaná er komið alment fram, at einki var at finna hvørki á telefonunum ella í teldunum.

## Ein maður vísti fyri henni

– Tá ið elsta dóttir okkara var smábarn, vórðu hon og tvey onnur børn einaferð úti fyri, at ein maður í Klaksvík vísti fyri teimum, og tað hevur givið dóttrini mein. Meðan vit enn búðu í Klaksvík, hevði hon mangan marruna av hesum. Summatíðir hevur hon verið heilt langt niðri og havt tað ringt sálarliga. Skúlin visti, at hon hevur tað so, og tá fekk hon frið til at sita einsamøll, sigur Hans Eiler Hammer.

Ein dag í apríl sat hon aftur fyri seg sjálva, og lærarin vildi vita, hvat bagdi. Hon var tung í huga, svaraði gentan.

Flokslærarin fór tá til heilsusystrina, og tey høvdu eina samtalu við gentuna.

– Hon varð tráðspurd, og tey vístu til eitt mál í Føroyum, sum einki hevði við hetta at gera, sigur Hans Eiler Hammer.

Tey vildu eisini vita, um hon ella nakað av hinum systkinunum varð sligið heima, og gentan, sum var hart kroyst, fortaldi, at tað einasta var, at mamman eina ferð hevði flongt tann yngsta beiggjan. Nei, pápin hevði ongantíð gjørt nakað.

## SMS-ið

Gentan kom tá at nevna, at pápin eina ferð hevði sent henni eitt sms.

Og so fór øll myllan í gongd.

Hans Eiler Hammer sigur, at eisini heima vildi gentan viðhvørt bara vera einsamøll á kamari sínum.

Eina nátt sendir dóttirin pápa sínum eitt sms um, at nú var aftur galið. Hon kláraði ikki meira.

– Eg skrivaði aftur og spurdi, um eg skuldi koma inn at leggja meg hjá henni. Hetta tulkaði barnaverndin sum kynsligt misbrúk, sigur Hans Eiler Hammer.

▶